Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Viðgerðartilboð til gikta- og psoriasissjúklingar

Spurningar:

1. Hví er fyribyrgingartilboðið í Kroatia broytt, so færri gikta- og psoriasissjúklingar úr Føroyum sleppa avstað?
2. Hví eru krøvini munandi herd?
3. Hevur sjúkrahúsverkið nakað annað líknandi alternativ til sjúklingar, sum eru raktir av psoriasis og gikt?
4. Brúkar danska heilsuverkið líknandi viðgerðir sum fyribyrgingarleist?
5. Hví fylgja Føroyar ikki leistinum og krøvunum, sum danir brúka?

Viðmerkingar:

Gjøgnum fleiri ár hevur sjúkrahúsverkið saman við sjúklingafeløgum og donskum samstarvi skipað fyri túrum til Kroatia sum liður í viðgerð og fyribyrging av tungum sjúkragongdum fyri gikta- og psoriasissjúklingar í Føroyum.

Sum skilst hevur hetta tilboðið givið sjúklingum ein bata í gerandisdegnum og arbeiðslívinum og styrkt um lívsgóðskuna hjá fleiri. Uml. 20 sjúklingar hava nýtt tilboðið á hvørjum ári.

Brádliga er leisturin broyttur, soleiðis at heilt fáir sjúklingar sleppa avstað til hesar fyribyrgjandi viðgerðir. Krøvini eru broytt, og tí eru bert heilt fá, sum lúka treytirnar.

Hetta kann raka sjúklingarnar og teirra avvarðandi meint, umframt at tað kann kosta sjúkrahúsverkinum meira pening seinni í øktari sjúklingaviðgerð. Lívsgóðskan hjá fleiri er tongd at viðgerðunum.

Tilmælini frá Fólkaheilsuráðnum o.ø. fakkunnleika eru millum annað, at fyribyrgjandi parturin hjá frískum og sjúkum er grundarlagið undir einum heilsubetri lívi.

Rehabilitering er tí sett á breddan á flestum sjúklingaøkjum í sjúkrahúsverkinum.

Fyri at fáa greiðu á hesum máli verða hesir spurningar settir landstýrismanninum.

Á Løgtingi, 19. maj 2022

Jóhannis Joensen